# Næmingar í Havn hava ongastaðni at búgva

*Skúlaheimini í høvuðsstaðnum nøkta als ikki tørvin á kømurum til næmingar, ið koma aðrastaðni frá at nema sær útbúgving í Havn. Orsøkin til vaksandi bústaðartrupulleikan hjá næmingunum er ikki minst alsamt minkandi útboðið á privata íbúðarmarknaðinum. Trupulleikin er so stórur, at nú má okkurt gerast, verður sagt á Føroya Studentaskúla*

RÚNAR REISTRUP



*Formaðurin í næmingaráðnum á Føroya Studentaskúla, Kristianna Poulsen, kennir íbúðartrupulleikarnar bæði frá hinum næmingunum og frá síni egnu støðu. Hon mælir til at tvífalda talið á kømurum til tey lesandi á skúlanum, tí bústaðarneyðin er vorðin ein trupulleiki.* **Mynd: Álvur Haraldsen**

Næmingar, ið koma av bygd til Havnar at ganga í skúla, hava sera torført við at fáa nakað at búgva í í høvuðsstaðnum.

Skúlaheimini eru fullsett og seinnu árini er tað blivið bæði verri og dýrari at leiga kømur á privata íbúðarmarknaðinum.

Jógvan Dahl, kostinspektor á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum, kennir alt ov væl til íbúðartrupulleikan hjá næmingunum á skúlanum. Hann stendur fyri tveimum av teimum trimum skúlaheimunum, ið eru knýtt at skúlanum.

– Vit noyðast hvørt ár at siga nei við nógvar av umsøkjarunum, og tá vita vit eisini, at fleiri ikki hava tímað at søkt, tí tey so at siga kunnu vera vís í, at ikki er pláss fyri teimum.

Her er talan um fólk, ið ikki skulu ferðast sjóvegis fyri at koma til Havnar. Fólk av útoyggjum hava fyrstarætt til kømurini á skúlaheimunum, tí tey hava longsta vegin til Havnar. Og tí skal ein næmingur úr Norðstreymoy vera meira enn vanliga heppin fyri at fáa pláss.

Tey trý skúlaheimini, ið eru knýtt at Føroya Studentaskúla, kunnu hýsa tilsamans 27 fólkum.

– Men tað eru í hvussu er eisini fjøruti sum søkja hvørt ár, og tað høvdu verið fleiri um kømurini vóru fleiri. Sum nú er vita tey, at tey sleppa ikki inn, hóast tey søkja, sigur Jógvan Dahl.

### Út eftir einum ári

Í eini roynd at tryggja, at fólk, ið flyta til Havnar at byrja fyrsta árið á skúlanum, fáa tak yvir høvdið, er eitt av skúlaheimunum hjá Føroya Studentaskúla so at siga sett av til 1. árs næmingar.

Tað vil siga, at næmingar bert fáa kømur í eitt ár ísenn. Øll skulu søkja av nýggjum árið eftir. Tá so valt verður út millum umsøkjararnar, verða 1. árs næmingarnir tiknir framum øll onnur, og á henda hátt eru tað fá, ið sleppa at varðveita sín bústað longur enn fyrsta skúlaárið, tí nógvir 1. árs næmingar søkja hvørt ár.

– Hetta er absolut ikki besta loysnin, men hon tryggjar, at flestu avbygdanæmingar hava eitt stað at búgva fyrsta árið teir ganga á skúlanum. Men tað er keðiligt at vit mugu „blaka gomlu næmingarnar út" hvørt summar, tí ofta hava teir ongastaðni at fara, sigur Jógvan Dahl.

### Gjørdist húsvill

Kristianna Poulsen úr Vestmanna er formaður í næmingaráðnum á Studentaskúlanum í Hoydølum. Hon hevur tætt samband við næmingarnar á skúlanum og kennir tískil væl til íbúðartrupulleikan. Hon hevur eisini sjálv upplivað hvussu torført tað er at fáa nakað at búgva í í Havn.

Tá hon byrjaði á studentaskúlanum fyri tveimum árum síðan, fekk hon kamar á studentaskúlaheiminum við Hoydalsvegin. Men tað er á hesum skúlaheiminum, at næmingar skulu søkja um íbúð av nýggjum hvørt ár. Og av tí at tað vóru nógvir 1. árs næmingar, ið søktu, tá Kristiana skuldi byrja í 2.g, slapp hon ikki inn aftur á skúlaheimið við Hoydalsvegin. Hini skúlaheimini vóru eisini fullsett.

– Har var ikki annað at gera enn at flyta heimaftur til Vestamanna og so koyrdi eg við bussinum hvønn morgun og hvønn seinnapart, men tað gekk ikki væl. Tað er bara næstbest ikki at búgva í sama býi, sum man gongur í skúla, og eg hevði ofta ov lítla tíð at fyrireika meg í, tá eg endiliga kom heim, greiðir Kristianna Poulsen frá.

Hon royndi at finna kamar ella íbúð á privata íbúðarmarknaðinum, men ikki bar til at fáa nakað fyri rímiligan prís.

Endin var at hon flutti inn hjá einum familjulimi í Havn, har hon búi restina av skúlaárinum, alt meðan hon framvegis leitaði sær eftir íbúð.

### 2.500 takk

Ikki fyrr enn nú í summarferiuni, eftir at hava leitað í hálvtannað ár, eydnaðist tað endiliga at fáa eina íbúð í Havn fyri tað, ið Kristianna kallar »sámuligan prís«. Hesin prísur er 2.500, og hóast ikki nógv er eftir av lestrarstuðulinum, eftir at leigan er farin av, so er hetta bíligari enn tað, ið Kristianna higartil hevur funnið.

Sjálv arbeiðir hon eftir skúlatíð fyri at gjalda leiguna.

Sambært tølum, ið næmingaráðsformaðurin í Hoydølum hevur funnið fram, hava 82 av teimum tilsamans umleið 450 næmingunum á Studentaskúlanum í Hoydølum adressu uttan fyri Havnina.

Fleiri av hesum eru sjávsagt fólk, ið gjarna vilja búgva í heimbygd síni og koyra ímillum, men Kristianna Poulsen er ikki í iva um, at heilt nógv teirra høvdu viljað búð í Havn, um umstøðurnar vóru til tess.

– Men tað ber so at siga ikki til hjá teimum at fáa nakað at búgva í í Havn uttan at gjalda astronomiskar prísir fyri tað, sigur hon.

### Mugu byggja meir

Sambært næmingaráðsformanninum er tað mestsum ógjørligt hjá teimum, ið koma úr bygdum á Streymoynni, at fáa pláss á skúlaheimunum í Havnini. Tí tey, ið koma frá útoyggjum, hava enn størri tørv á bústaði í Havn og verða tí tikin framum umsøkjararnar av Streymoynni.

Og tá sjálvt tey av útoyggjunum ofta hava sera trupult við at fáa pláss á skúlaheimunum, sigur tað ikki so lítið um hvussu støðan er hjá streymoyingum.

Einasta vónin hjá hesum næmingum er, at fleiri skúlaheim verða bygd í næstum

– Nú hevur í longri tíð verið tosað um at byggja ein nýggjan studentaskúla í Havn. Men eg haldi at har átti man fyrst at hugsað um at tryggja næmingum møguleika at leiga sær bústað í býnum, tí fyri nógv er eitt kamar í Havn meira átrokandi enn ein nýggj skúlastova, sigur næmingaráðsformaðurin í Hoydølum, sum heldur at tað hevði verið hóskandi at tvífaldað talið á kømurum til studentaskúlanæmingarnar í Hoydølum.

– Tað hevði neyvan verið nakar trupulleiki at leigað tvífalt so nógv kømur út til næmingarnar her á skúlanum, sigur Kristianna

### Færri næmingar, men størri trot

Bústaðartrupulleikin hjá næmingunum á Føroya Studentaskúla er verri nú enn hann hevur verið farnu árini. Hetta hóast næmingatalið var væl størri fyri nøkrum árum síðan. Orsøkin er eftir øllum at døma, at útboðið á privata íbúðarmarknaðinum er nógv minni nú enn í árunum eftir kreppuna, og tí er torført hjá næmingunum bæði at finna og ikki minst at gjalda fyri kømur uttan fyri skúlaheimini.

Leiðslan á Føroya Studentaskúla fer í næstum at taka málið upp, sigur Jógvan Dahl, kostinspektor á Føroya Studentaskúla.

– Eg havi sett málið um bústaðartrupulleikarnar á skránna á einum av okkara fyrstu fundum í hesum skúlaárinum, sigur hann og vónar, at skjótt farið verður undir at skaffa fleiri kømur til tey lesandi á skúlanum.

– Tað finnast dømi um, at næmingar av bygd heldur taka miðnámsútbúgving uttanlands enn í Havn við teirri grundgeving, at tað er lættari at fáa íbúð í lestrarbýunum í Danmark enn tað er í Havn. Tað sigur nakað um hvussu stórur trupulleikin er, sigur Jógvan Dahl, kostinspektor á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði.



# Samgongulimir ivasamir um brævið til ST

*Í Fólkaflokkinum eru politikarar bangnir fyri, at brævið frá landsstýrinum til ST kann skaða viðurskiftini millum Danmark og Føroyar. Sjálvstýrisflokkurin heldur landsstýrið hava svikið uttanlandsnevndina*

JOHN JOHANNESSEN

Brævið frá uttanlandsdeildini í Tinganesi til ST er politiskt, tá nevnt verður, at Danmark ikki vil samráðast við føroyingar um føroyskt fullveldi.

Hetta heldur Jákup Sverri Kass, tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin og limur í uttanlandsnevndini.

Somuleiðis heldur Jákup Sverri Kass tað vera skeivt av landsstýrinum at hava sent hetta brævið avstað, uttan at kunna uttanlandsnevndina um hetta áðrenn.

– Higartil hevur kunningin frá landsstýrinum til uttanlandsnevndina um fullveldismálið verið góð, men í hesum føri hevur hon ikki verið nøktandi, heldur Jákup Sverri Kass.

### Fólkaflokkurin varin

Í Fólkaflokkinum eru tinglimirnir ikki so bersøgnir um áheitanina frá uttanlandsdeildini í landsstýrinum á ST um at fáa at vita um mannagongdirnar fyri at fáa triðja part upp í samráðingarnar.

Jógvan við Keldu, tingmaður fyri Fólkaflokkin og limur í uttanlandsnevndini, sýtir fyri at gera viðmerkingar til fjølmiðlarnar um málið. Hann sigur, at hann sjálvur fer at skriva sínar viðmerkingar í bløðunum.

Óli Breckmann, formaður í tingbólki Fólkafloksins, vil heldur ikki gera viðmerkingar til brævið.

Men nýggi landsstýrismaðurin hjá Fólkaflokkinum, Bjarni Djurholm, sigur, at um skrivihátturin í brævinum til ST kann uppfatast politiskt, gagnar hetta í øllum førum ikki viðurskiftunum Danmarkar og Føroya ímillum. Men er talan bert um eitt embætistekniskt bræv, heldur hann tað vera í lagi, tí at øll upplýsing gagnar sjálvsagt málinum.

Bjarni Djurholm leggur tó dent á, at hann enn ikki hevur sæð brævið, men at hann ætlar sær at lesa tað og fáa viðmerkingar frá teimum, ið hava ábyrgdina av tí.

Nýggi landsstýrismaðurin sigur seg principielt vera ímóti at draga ST upp í fullveldissamráðingarnar, sum semingsmann.

Formaðurin í tingbólki Tjóðveldisfloksins, Heini O. Heinsen, heldur ikki, at landsstýrið hevur gjørt nakað skeivt, tá tað sendi ST brævið. Hann vísir á, at neyðugt er við álvarsomum stigum, fyri at fáa donsku stjórnina at samráðast. Men í hesum føri heldur Heini O. Heinesen, at talan bert er um eitt embætistekniskt bræv.

### Bera seg at sum smádreingir

Tá útvarpið fyrradagin bar tíðindini um, at landsstýrið hevði sent fyrispurningin, skírdu formenninir í báðum teimum stóru andstøðuflokkunum, Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard, ávikavist brævið at vera eina politiska bumbu og beinleiðis láturligt.

Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen vóru báðir á einum máli um, at landsstýrið við brævinum hevði forpestað viðurskiftini millum Danmark og Føroyar upp aftur meira, og at brævið fór at verða hildið at vera láturligt millum øll Norðurlond.

Eisini hildu báðir formenninir, at landsstýrið í hesum føri hevði brotið lyfti sítt um at kunna uttanlandsnevndina um øll viðurskifti í fullveldismálinum.

Men formaðurin í triðja andstøðuflokkinum, Jenis av Rana úr Miðflokkinum, heldur beinleiðis, at útsagnirnar hjá Edmundi Joensen og Jóannesi Eidesgaard eru ov langt úti.

– Hetta málið er at meta sum stormur í einum vatnglasi. Og eg haldi, at formenninir fyri størstu andstøðuflokkarnar eru farnir at bera seg at sum smádreingir, sigur Jenis av Rana.

Jenis av Rana vísir á, at uttanlandsnevndin er kunnað um, at landsstýrið fór at kanna møguleikarnar fyri at fáa ST upp í samráðingarnar. Hetta fekk uttanlandsnevndin at vita eftir seinasta samráðingarfundin á Christiansborg.

Í hesum sambandi vísir Jenis av Rana á, at Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen ikki vóru við uttanlandsnevndini til seinasta samráðingarfundin, tí teir eru ímóti øllum kanningum og allari kunning í sambandi við fullveldismálið.

### Brævið er politiskt

Jenis av Rana heldur kortini, at tað ikki átti at verið neyðugt at skriva í brævinum, at danska stjórnin ikki vil samráðast við føroyingar. Hetta heldur hann vera eina politiska niðurstøðu.

– Eg haldi ikki, at til ber at siga, at danska stjórnin ikki vil samráðast. Trupulleikin hjá landsstýrinum er bert, at stjórnin ikki vil geva eina skiftistíð, ið er longri enn fýra ár, sigur Jenis av Rana.






Til landsdyst í Zürich

**Sveis - Føroyar**

Beinleiðis úr Vágum

**Stuðlið landsliðnum og njótið harafturat 9 dagar í bergtakandi landinum, frá 4. til 12. okt.**

**Fráferð:** Beinleiðis úr Vágum til Zürich tann 4/10 kl. 17.30
**Heimaftur:** Beinleiðis úr Zürich í Vágar tann 12/10 kl. 21.45

**Gisting:** Gist verður í 9 dagar/8 nætur í Sveis, møguleiki er at velja ímillum 2 trístjørnað hotell mitt í gamla býnum.

**Útferðir:** Skipað verður eisini fyri útferðum (ikki íroknað prísin)

Kostnaður:

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Hotel Scheuble** | fyri hvønn á einkultkamari | kr. | **9.550,-** |
| **Hotel Scheuble** | fyri hvønn á dupultkamari | kr. | **7.735,-** |
| **Hotel Adler** | fyri hvønn á einkultkamari | kr. | **8.590,-** |
| **Hotel Adler** | fyri hvønn á dupultkamari | kr. | **7.100,-** |

**Íroknað prísin er:** Flogferð, gisting við morgunmati, bussflutningur frá flogvølli til hotell og aftur, bussflutningur frá hotell til stadion og aftur, atgongumerki til dystin og ferðaavgjøld.

Seinasta freist at tekna seg er 4/9-2000

Atlantic Airways
tel 333 900 • fax 333380

SANSIR